# Fíggjarmálaráðið

**Løgtingið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 22. sept. 2020 |
| Mál nr.: | 20/00411 |
| Málsviðgjørt: | AP |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Løgtingsmál nr. xx/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu**
(Broyting av allýsingini av lendisakførum, atgongd til upplýsingar úr Akfarsskránni, umbýtan av bretskum koyrikorti til føroyskt koyrikort, broyting í heimildunum hjá landsstýrismanninum og broyting í ásetingunum um gjøld fyri skoðan)

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu

(Broyting av allýsingini av lendisakførum, atgongd til upplýsingar úr Akfarsskránni og umbýtan av bretskum koyrikorti til føroyskt koyrikort, broyting í heimildunum hjá landsstýrismanninum og broyting í ásetingunum um gjøld fyri skoðan)

### § 1

Í løgtingslóg um ferðslu sbrt. løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 158 frá 13. desember 2018, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 2, III, litra D verður orðað soleiðis:
   "**D. Lendisakfar – ATV:** Motordrivið akfar á 4 ella fleiri hjólum, sum í høvuðsheitum er útgjørt sum lendisakfar, og sum kann verða útgjørt við last ella viðførisberara."

2. Yvirskriftin yvir § 11 verður orðað soleiðis:

   *"Skráseting av motordrivnum akførum o.a."*

3. Yvirskriftin yvir § 11 a verður orðað soleiðis:

   *"Serligar reglur fyri lendisakfør"*

4. § 11 a verður orðað soleiðis:
   "**§ 11 a.** Fyri at kunna skrásetast, skal lendisakfar hava eina eginvekt, sum er yvir 190 kg og eina motororku, sum er

størri enn 15 kW. Akfarið skal vera útgjørt við last ella viðførisberara.
*Stk. 2.* Lendisakfar kann bert koyra á ella tvørtur um veg í sambandi við yrkisligan flutning til ella frá ella millum arbeiðsøki, og skal flutningurin tá fara fram á stytst møguligum strekki."

**5.** § 11 b verður orðað soleiðis:
"**§ 11 b.** Atgongd til elektroniskar upplýsingar úr akfarsskránni, kann latast hesum almennu myndugleikum:
1) Løgregluni
2) TAKS
3) Føroya Landfúta
4) Umhvørvisstovuni
5) Føroya Rætti
6) Endurnýtsluni á Hjalla og IRF og
7) kommununum
*Stk. 2.* Atgongd til elektroniskar upplýsingar um navn og bústað hjá eigarum og brúkarum av akførum og tøkniligar upplýsingar um akfør, kunnu latast úr akfarsskránni hjá Akstovuni til tryggingarfeløg í Føroyum.
*Stk. 3.* Atgongd til elektroniskar stakupplýsingar um navn og bústað hjá eigarum og brúkarum av akførum og tøkniligar upplýsingar um akfarið, kunnu latast úr akfarsskránni hjá Akstovuni til hesi feløg og stovnar, sum krevja inn gjald fyri nýtslu av almennum tænastum, treytað av, at hvørt akfar sær frammanundan er eyðmerkt við at upplýsa nummarspjaldur:
1) P/F Tunnil, vegna P/F Vágatunnilin, P/F Norðoyatunnilin og P/F Eysturoyar- og Sandoyartunlar og
2) P/F Vága Floghavn
*Stk. 4.* Atgongd til elektroniskar stakupplýsingar um navn og bústað hjá eigarum og brúkarum av akførum og tøkniligar upplýsingar um akfør, kunnu latast úr akfarsskránni hjá Akstovuni til peningastovnar í Føroyum í sambandi við tinglýsing av panti í akfarinum í akfarsbókini hjá Umhvørvisstovuni, treytað av, at hvørt akfar sær frammanundan er eyðmerkt við at upplýsa nummarspjaldur.
*Stk. 5.* Atgongd til elektroniskar stakupplýsingar um navn, bústað og telefon nummar hjá eigarum og brúkarum av akførum, sum av ósketni ikki hava rindað fyri brennievnið, kunnu latast til oljufeløg.
*Stk. 6.* Atgongd til elektroniskar stakupplýsingar um merki, model skrokknummar og árgang á akførum kann latast úr akfarsskránni hjá Akstovuni til bilasølur, verkstøð og eykalutasølur treytað av, at hvørt akfar sær frammanundan er eyðmerkt við at upplýsa nummarspjaldur.
*Stk. 7.* Atgongd til elektroniskar stakupplýsingar um tøkniligar upplýsingar á akførum kann latast úr akfarsskránni hjá Akstovuni til tilbúgvingar, treytað av, at hvørt akfar sær frammanundan er eyðmerkt við at upplýsa nummarspjaldur.
*Stk. 8.* Upplýsingar fingnar eftir stk. 1-5 mugu ikki latast øðrum privatum uttan so, at hetta er heimilað í lóg.
*Stk. 9.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri treytir fyri atgongd til skrásettar upplýsingar, sum verða latnir eftir stk. 1-7, og kann áseta gjald til Akstovuna fyri upplýsingar, sum verða latnar eftir stk. 3-7."

**6.** Yvirskriftin yvir § 15 verður orðað soleiðis:

*"Tilvitsávirkandi evni, sjúka, overving o.a."*

**7.** Yvirskriftin yvir § 16 verður orðað soleiðis:

*"Rúsdrekkakoyring o.a."*

**8.** Yvirskriftin yvir § 16 a verður orðað soleiðis:

*"Eftirlit o.a."*

**9.** Í § 21, stk. 3 verður eftir “Íslandi” sett: “, Stóra Bretlandi”.

**10.** Yvirskriftin yvir § 25 verður orðað soleiðis:

*“Neyðsendarkoyring o.a.”*

**11.** Yvirskriftin yvir § 27 verður orðað soleiðis:

*“Forboð fyri at hanga uppi í akfari og forboð fyri spæli o.a.”*

**12.** Yvirskriftin yvir § 28 verður orðað soleiðis:

*“At seta ella leggja nakað frá sær á vegi o.a.”*

**13.** Yvirskriftin yvir § 32 verður orðað soleiðis:

*“Víkiskylda o.a.”*

**14.** Í § 55 b, stk. 1, 1. pkt. verður “ásetir” broytt til: “kann áseta”.

**15.** Í § 55 b, stk. 1, 2. pkt. verður “ásetir samstundis” broytt til: “kann samstundis áseta”.

**16.** Í § 55 b, stk. 1, 3. pkt. verður “ásetir hann” broytt til: “kann landsstýrismaðurin áseta”.

**17.** Yvirskriftin yvir § 58 verður orðað soleiðis:

*“VII Revsing o.a.”*

**18.** Í § 58 a, stk. 2 verður “§ 16, stk. 5-6” broytt til: “§ 16, stk. 4-5”.

**19.** Í § 58 g, stk. 3 verður “rúsdrekka- og promillukoyring” broytt til: “rúsdrekkakoyring”.

**20.** Í § 64 a, stk. 3 verður: “gerandisdagin áðrenn” broytt til: “sama dag fyri”.

**21.** Í § 64 b, stk. 3 verður: “gerandisdagin áðrenn” broytt til: “sama dag fyri”.

**22.** Í § 64 c, stk. 4 verður: “gerandisdagin áðrenn” broytt til: “sama dag fyri”.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Ásetingarnar í § 8 í løgtingslóg um fast samband um Vestmannasund, § 6 í løgtingslóg um fast samband um Leirvíksfjørð, § 12 í løgtingslóg um at stovna partafelag og at byggja og reka undirsjóvartunlar millum Streymoy og Eysturoy og millum Streymoy og Sandoy, og í § 1 í løgtingslóg um rætt hjá P/F Vága Floghavn at fáa upplýsingar frá Akstovuni verða í gildi, til landsstýrismaðurin hevur sett kunngerðina í § 11 b, stk. 9, sum ásett í § 1, nr. 5, í gildi.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Lendisakfør/ATV
Tann 27. apríl 2017 varð ein dómur sagdur í Føroya Rætti. Ein persónur hevði við einari promillu á 2,07 koyrt á einum ikki-skrásetingarskyldigum lendisakfari/ATV á almennum vegi. Føroya Rættur metti ikki, at lendisakfarið kom undir allýsingina av, hvat eitt motordrivið akfar, sbrt. § 2, III, litra D í ferðslulógini, er. Orsakað av hesum verður mett, at brotið ikki kemur undir § 16, stk. 1 í ferðslulógini, og av somu orsøk metir Føroya Rættur heldur ikki, at málið er umfatað av § 11 a í ferðslulógini.

Skotið verður tí upp at broyta ásetingarnar í ferðslulógini soleiðis, at allýsingin av lendisakførum verður víðkað fyri at sleppa undan, at omanfyrinevnda endurtekur seg.

Akfarsskráin
Atgongd hjá heimilaðum myndugleikum, stovnum og øðrum til akfarsskránna hjá Akstovuni er í verandi støðu ikki savnað í einari lóg, men er í staðin ásett í fleiri einstøkum lógum. Hetta verður mett at vera óheppið, og so hvørt sum fleiri onnur áhugað søkja um atgongd til akfarsskránna skal lóggevast um hetta av nýggjum hvørja ferð. Tí verður mælt frá at gera fleiri einstakar lógir á hesum øki.

Skotið verður upp, at atgongd til elektroniskar upplýsingar um eigarar, brúkarar og akfør í akfarsskránni hjá Akstovuni verður skipað hjá heimilaðum pørtum í eina nýggja grein í ferðslulógini, sum greitt tilskilar atlit og treytir fyri atgongd, og at landsstýrismaðurin fær heimild til í kunngerð at áseta nærri treytir fyri atgongdina til skrásettu upplýsingarnar og til at áseta gjald til Akstovuna fyri upplýsingar, sum verða latnar øðrum enn almennum myndugleikum og tryggingarfeløgum.

Umbýtan av bretskum koyrikorti
Tann 31. januar 2020 fór Stóra Bretland endaliga úr ES. Fram til árslok 2020 er eitt tillagingarskeið sett í gildi fyri Stóra Bretland, sum merkir, at Stóra Bretland nýtir gott av teimum rættindum, sum vóru galdandi, meðan Stóra Bretland var limur í ES. Eftir, at tillagingartíðarskeiðið er farið við árslok, er ikki longur møguligt hjá bretskum ríkisborgarum at umbýta bretsk koyrikort við føroysk koyrikort, uttan at farið verður til eina eftiransandi koyriroynd (teori og koyring, tó uttan frálæru). Fyri Stóra Bretland merkir hetta, at Stóra Bretland verður javnstillað við 3. lond. Hetta eru lond úr eitt nú Afrika. Tí verður tað mett neyðugt at gera broyting í ferðslulógini fyri at tryggja, at bretskir ríkisborgarar framhaldandi kunnu býta sítt bretska koyrikort um við eitt føroyskt koyrikort, um tørvur er á tí.

Broyting í heimildarreglunum hjá landsstýrismanninum
Ein borgari kærdi til Løgtingsins Umboðsmann um, at landsstýrismaðurin ikki hevði sett ásetingarnar, sbrt. § 55 b, stk. 1. Í greinini er tríggjar ferðir ásett, at "landsstýrismaðurin ásetir" treytir og reglur um m.a. hvussu tryggingarskyldan skal fremjast. Orðingin er óheppin, og mælt verður til, at hon verður broytt soleiðis, at hon framyvir ikki áleggur landsstýrismanninum óneyðugar skyldur.

Broyting í ásetingunum um gjøld fyri skoðan
Tað vísir seg ofta at vera trupult hjá viðskiftafólki at vita dagin fyri, um tú dagin eftir kanst møta til sýn ella ikki. Í verki er hetta trupult at umsita og skapar javnan truplar støður millum viðskiftafólkið og Akstovuna.

## 1.2. Galdandi lóggáva

Lendisakfør
Ásetingarnar um lendisakfør kom inn í ferðslulógini við løgtingslóg nr. 36 frá 30. apríl 2012. Har verður lendisakfar allýst sum eitt motordrivið akfar á fýra hjólum ella fleiri og við eini eginvekt yvir 190 kg. Motororkan skal vera størri enn 15 kW. Akfarið skal vera útgjørt við last ella viðførisberara.

Akfarsskráin
Eftir galdandi ferðslulóg eru tað bara kommunalu tilbúgvingarnar í Føroyum, sum hava atgongd til upplýsingar úr Akfarsskránni

Hinvegin er ásett í einstøku løgtingslógunum um undirsjóvartunlar undir Vestmannasundi (løgtingslóg nr. 6 frá 8. februar 2000) og Leirvíksfirði (løgtingslóg nr. 33 frá 26. mars 2002) og millum Streymoy og Eysturoy og millum Streymoy og Sandoy, (løgtingslóg nr. 30 frá 14. apríl 2014), at feløgini hava rætt til at fáa upplýsingar frá Akstovuni um skrásettar eigarar/brúkarar av akførum til tess at eftiransa gjaldsstaðnum. Somuleiðis er tað ásett í løgtingslóg nr. 48 frá 12. mai 2015, um rætt hjá P/F Vága Floghavn at fáa upplýsingar frá Akstovuni. Felagið hevur rætt til at fáa elektroniska atgongd til at biðja um stakupplýsingar úr akfarsskránni hjá Akstovuni um ein avmarkaðan skara av akførum við at upplýsa nummarspjaldur. Endamálið er at krevja inn gjald fyri nýtslu av parkeringsøkinum hjá P/F Vága Floghavn.

Umbýtan av bretskum koyrikorti
Eftir galdandi áseting í ferðslulógini kunnu bretskir ríkisborgarar býta sítt bretska koyrikort um við eitt samsvarandi føroyskt koyrikort, tí teir, sum limir í ES, eru umfataðir av lógini. Hetta er galdandi fram til árslok, tá tillagingartíðin hjá Stóra Bretlandi gongur út.

Verandi § 21 í ferðslulógini er soljóðandi:

**§ 21.** Persónar, ið ikki hava bústað í Føroyum, kunnu uttan at hava føroyskt ella danskt koyrikort á dvøl her á landi føra motorakfar eftir reglum, ið landsstýrið setir.
*Stk. 2.* Landsstýrið kann seta reglur um, við hvørjum treytum, ið persónar, ið hava rættindi til at føra motorakfar í útlondum, kunnu fáa føroyskt koyrikort.
*Stk. 3.* Landsstýrið kann áseta, at koyrikort, sum útgivin eru í Noregi, Íslandi ella í landi, sum er limur í Evropeiska Samveldinum, fáa gildi her á landi, eisini eftir, at handhavarin hevur tikið bústað her.

Broyting í heimildarreglunum hjá landsstýrismanninum
Eftir galdandi áseting í ferðslulógini skal landsstýrismaðurin seta í gildi ásetingar um treytir og reglur um m.a. hvussu tryggingarskyldan skal fremjast.

Broyting í ásetingunum um gjøld fyri skoðan
Eftir verandi ásetingum um skoðan, skal viðskiftafólkið boðað frá í seinasta lagi gerandisdagin áðrenn ásettu skoðanina, sýnið, ella umskoðanina, umsýnið, um viðkomandi ikki fær møtt við bilinum. Um hetta ikki verður gjørt, verður eitt eyka gjald rinda til Akstovuna.

### 1.2. Endamálið við uppskotinum

Lendisakfør
Endamálið er at víðka allýsingina av lendisakførum soleiðis, at persónar, sum t.d. koyra ávirkaðir á einum ikki-skrásettum lendisakfari á almennum vegi, eisini verða fevndir av ásetingunum í ferðslulógini og harvið eisini kunnu revsast.

Akfarsskráin
Í sambandi við viðgerðina á vári 2015 av løgtingslóg um atgongd hjá P/F Vága Floghavn til skrásettar upplýsingar í akfarsskránni hjá Akstovuni (løgtingslóg nr. 48 frá 12. mai 2015), varð tað mett óheppið at halda fram við fleiri einstøkum lógum um somu heimildir til ymisk endamál. Frammanundan eru heimildir í løgtingslógunum um fast samband um Vestmannasund, Leirvíksfjørð og millum Streymoy og Eysturoy og Streymoy og Sandoy.

Samstundis eru tað onnur áhugað, so sum føroysku peningastovnarnir og eykalutasølur, sum eisini ynskja atgongd til avmarkaðar upplýsingar úr akfarsskránni uttan, at ítøkilig lógarheimild er fyri slíkari atgongd.

Akstovan hevur víst á, at tað er óheppið, at myndugleikar og stovnar, sum av eftirlitsávum hava atgongd til akfarsskránna við heimild í øðrum serlógum, ikki eisini eru fevndir av eini ítøkiligari heimild í ferðslulógini um atgongd til skrásettar upplýsingar í akfarsskránni.

Skotið verður tí upp, at skipaðar reglur verða um elektroniska atgongd hjá almennum eftirlitsmyndugleikum, tryggingarfeløgum í Føroyum, feløgum og stovnum, sum krevja gjald fyri nýtslu av almennum økjum og tænastum, peningastovnum í Føroyum, tilbúgvingum, bilasølum, verkstøðum og eykalutasølum, og at landsstýrismaðurin fær heimild í kunngerð at áseta nærri treytir fyri atgongd til skrásettar upplýsingar og at áseta gjald til Akstovuna fyri upplýsingar, sum verða latnar eftir § 11 b, stk. 3-6. Gjaldið er eitt íbindingargjald, sum er í samsvari við kostnaðin av íbindingini, og eitt árligt gjald, sum er í samsvari við rakstur, loyvir og atgongd til skrásettar upplýsingar.

Akstovan fær leypandi ítøkiligar fyrispurningar um navnaupplýsingar úr akfarsskránni. Meginparturin av hesum fyrispurningunum kemur frá bensinsølum kring landið, tá fólk hava gloymt at rinda fyri bensin/olju.
Fyri 2019 fekk Akstovan uml. 600 fyrispurningar, sum svarar til uml. 1000 bilar. Higartil í 2020 hevur Akstovan fingið uml. 500 fyrispurningar, sum svarar til uml. 700-800 akfør.

Umbýtan av bretskum koyrikorti
Endamálið er at víðka § 21, stk. 3 í ferðslulógini. Hetta verður gjørt við, at Stóra Bretland nágreiniliga verður nevnt í ásetingini.

Uppskotið skal tryggja bretskum ríkisborgarum somu rættindi og møguleikar til at býta bretska koyrikort um við eitt samsvarandi føroyskt koyrikort, eins og teir frammanundan hava havt møguleika fyri, sum partur av ES.

Broyting í heimildarreglunum hjá landsstýrismanninum
Endamálið við broytingini er, at landsstýrismaðurin ikki skal verða álagdur at seta ásetingar í gildi, sum ikki eru neyðugar.

Broyting í ásetingunum um gjøld fyri skoðan
Endamálið við broytingunum er at sleppa undan keðiligu støðunum, sum ofta taka seg upp ímillum viðskiftafólk og Akstovuna, tá ið viðskiftafólk sama dag, sum skoðanin ella umskoðanin er, boða frá, at tað ikki ber til at møta til sýn ella umsýn við bilinum. Akstovan skal tá, sbrt. ferðslulógini, krevja inn eitt eyka gjald fyri ov seina fráboðan til Akstovuna.

**1.3. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**

Lendisakfør
Víðkanin av allýsingini fyri lendisakfar hevur við sær, at øll lendisakfør verða fevnd av allýsingini, og sostatt eisini fevnd av ásetingunum í ferðslulógini, um tey koyra á ferðslulógarinnar øki, sum kann vera ein vegur, gøta, pláss o.a. Avmarkingin av støðd og nýtslu av lendisakførum eru nú sett í serligar reglur fyri lendisakfør í § 11 a.

Akfarsskráin
Flestu áhugapartarnir hava longu sum nú er lógarheimild til atgongd til skrásettar upplýsingar úr Akfarsskránni. Tó verður mett neyðugt at henda lógarheimildin skal gerast ítøkilig í eini grein í ferðslulógini.

Umbýtan av bretskum koyrikorti
Bretland fór endaliga úr ES 31. jan. 2020, men hevur eina avtalu við ES um eina tillagingartíð fram til árslok. Fyri Stóra Bretland merkir hetta, at bretskir ríkisborgarar kunnu býta teirra koyrikort um við eitt føroyskt koyrikort fram til 31. des. 2020.

Við at víðka § 21, stk. 3 í ferðslulógini til eisini at fevna um Stóra Bretland hevur hetta við sær, at bretskir ríkisborgarar framhaldandi kunnu býta teirra bretska koyrikort um við eitt samsvarandi føroyskt koyrikort, eisini eftir, at tillagingartíðin er farin.

Broyting í heimildarreglunum hjá landsstýrismanninum
Broytingarnar hava við sær, at landsstýrismaðurin framyvir ikki skal seta ásetingar í gildi, sum ikki eru neyðugar, men at hann kann seta tær í gildi, um hetta verður mett at vera neyðugt.

Broyting í ásetingunum um gjøld fyri skoðan
Framyvir kunnu viðskiftafólk boðað frá sama dag, sum tey skulu møta til skoðan ella umskoðan, uttan at eyka gjald verður goldið.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Yvirlit yvir tey, sum hava fingið lógaruppskotið til ummælis:

- Uttanríkis- og mentamálaráðið
- Vinnumálaráðið
- Vinnuhúsið

- Akstovan
- Føroya Landfúti
- Føroya Politistafelag
- TAKS
- Kommunufelagið
- Ráðið fyri Ferðslutrygd
- Dómaraskrivstovan
- Felagið fyri føroyskir advokatar
- Tryggingarfelagið Føroyar
- Trygd
- Dátueftirlitið
- Felagið fyri Peningastovnar
- Tunnil.fo
- P/f Vága Floghavn
- P/F Eysturoyar- og Sandoyartunlar
- Umhvørvisstovan
- Bilhandlarafelagið
- FTZ
- Mekonomen

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lendisakfør
Ongar fíggjarligar avleiðingar eru av lógaruppskotinum fyri land ella kommunur.

Akfarsskráin
Uppskotið fer ikki at hava stórvegis fíggjarligar avleiðingar fyri landið ella landsstovnar. Teir kostnaðir, sum Akstovan fer at hava av øktari atgongd til elektroniskar upplýsingar úr akfarsskránni, verða eftir uppskotinum rindaðir við íbindingar- og rakstrargjaldi.

Umbýtan av bretskum koyrikorti
Ongar fíggjarligar avleiðingar eru av lógaruppskotinum fyri land ella kommunur.

Broyting í heimildarreglunum hjá landsstýrismanninum
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri land ella kommunur.

Broyting í ásetingunum um gjøld fyri skoðan
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri land ella kommunur.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lendisakfør
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

Akfarsskráin
Uppskotið fer at gera umsitingina hjá Akstovuni lættari við tað, at Akstovan sleppur undan dagligu umbønunum um innlit í navn og bústað hjá eigarum og brúkarum av akførum frá eitt nú peningastovnum og bensinsølum.

Umbýtan av bretskum koyrikorti
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

Broyting í heimildarreglunum hjá landsstýrismanninum
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land ella kommunur.

Broyting í ásetingunum um gjøld fyri skoðan
Tað verður lættari hjá Akstovuni, sum sleppur undan truplum støðum við viðskiftafólki.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lendisakfør
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri vinnuna.

Akfarsskráin
Uppskotið um atgongd til elektroniskar upplýsingar úr akfarsskránni fer at hava jaligar avleiðingar fyri vinnuna við tað, at lættari verður at sleppa framat umbidnu upplýsingunum.

Umbýtan av bretskum koyrikorti
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri vinnuna.

Broyting í heimildarreglunum hjá landsstýrismanninum
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri vinnuna.

Broyting í ásetingunum um gjøld fyri skoðan
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ongar umhvørvisligar avleiðingar.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar við sær fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóða sáttmálar á ferðsluøkinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar eru ikki á økinum, sum lógaruppskotið fevnir um.

**2.9. Markaforðingar**
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið inniheldur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Ásetingar um skatt ella avgjøld eru ikki í lógaruppskotinum.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið gevur landsstýrismanninum heimild til at áseta nærri reglur og treytir fyri atgongd til skrásettar upplýsingar úr Akfarsskránni, sum verða latnar eftir § 1, nr. 5 í lógaruppskotinum.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar við sær enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**

**Til nr. 1, § 2, III, litra D**
Skotið verður upp at broyta allýsingina fyri lendisakfør/ATV soleiðis, at allýsingini fevnir um øll lendisakfør, bæði skrásetingarskyldug og ikki-skrásetingarskyldug. Orsøkin til broytingina er dómur, sum bleiv sagdur í Føroya Rætti, har persónur við høgari promillu bleiv fríkendur fyri koyring á einum ikki-skrásetingarskyldugum lendisakfari á almennum vegi, hóast hann var rúsdrekkaávirkaður.

**Til nr. 2, yvirskriftin yvir § 11**
Talan er bert um eina málsliga broyting av tí, at *v.m.* ikki er ein føroysk stytting. Tí verður styttingin broytt til *o.a.*

**Til nr. 3, yvirskriftin yvir § 11 a**
Skotið verður upp, at víðka orðingina av yvirskriftini til at fevna um reglur fyri lendisakfør.

**Til nr. 4, § 11 a**
Fylgjan av broyttu allýsingini fyri lendisakfør í nr. 1 í lógaruppskotinum er, at reglurnar um skráseting og nýtslu av lendisakførum verður sett sum eitt nýtt stk. 1 í § 11 a.

**Til nr. 5, § 11 b**
Skotið verður upp, at broyta ásetingarnar í **§ 11 b** í ferðslulógini til at fevna um elektroniska atgongd hjá øðrum myndugleikum, stovnum og feløgum, sum av eftirlitsávum og í sambandi við útinnan av sínum virksemi, hava tørv á upplýsingum um akfør, eigarar og brúkarar í elektroniskum formi.

Í **§ 11 b, stk. 1** verður skotið upp, at atgongd til elektroniskar upplýsingar úr akfarsskránni hjá Akstovuni kunnu latast almennum eftirlitsmyndugleikum. Hesin listin er ikki lýstur út í æsir. Talan er um navnaupplýsingar um eigarar og brúkarar av akførum og um tekniskar upplýsingar um akfør hjá hesum áður nevndu.

Sum er, snýr tað seg um hesar eftirlitsmyndugleikar:
1) Løgreglan, sum hevur elektroniska atgongd til akfarsskránna í sambandi við kanning av einum akfari, fyri at fáa vitan um akfarið við heimild í § 13 í ferðslulógini.
2) TAKS, sum hevur elektroniska atgongd til akfarsskránna í sambandi við eftirlit við akførum, sum koma undir skattafrían ágóða og eru undantikin MVG við heimild í § 31, stk. 1 í løgtingslóg um meirvirðisgjald.
3) Fútaskrivstovan, sum hevur elektroniska atgongd til akfarsskránna í sambandi við eftirlit og umsiting av parkeringsskipanini, sbrt. § 58 e í ferðslulógini.
4) Umhvørvisstovan, sum hevur elektroniska atgongd til akfarsskránna, og Dómaraskrivstovan, sum ynskir elektroniska atgongd til akfarsskránna í sambandi við tinglýsing av panti í bilbókini, sbrt. kapittul 6 a í løgtingslóg nr. 55 frá 16. august 1962 um tinglýsing.
5) Kommunala Brennistøðin og IRF, sum hava atgongd til akfarsskránna í sambandi við útgjald av burturbeiningargjaldi fyri burturbeind akfør, sbrt. § 6 í kunngerð nr. 45 frá 11. mai 2010 um burturbeiningargjald á motorakførum.

6) Tórshavnar kommuna, sum ynskir elektroniska atgongd til upplýsingar um nummarspjøldur og eigarar í akfarsskránni í sambandi við at veita parkeringsloyvi til íbúgvar í miðbýnum.

Hetta verður gjørt fyri at skipa ein frammanundan galdandi rætt hjá hesum myndugleikum til skrásettar upplýsingar á einum samlaðum og skipaðum stað í ferðslulógini.

Við heimild í § 11 b, stk. 9 ætlar landsstýrismaðurin í kunngerð at áseta nærri treytir fyri atgongd til skrásettar upplýsingar til omanfyri nevndu myndugleikar.

Skotið verður upp í **§ 11 b, stk. 2**, at atgongd til elektroniskar upplýsingar um navn og bústað hjá eigarum og brúkarum av akførum og tøkniligar upplýsingar um akfør kunnu latast úr akfarsskránni hjá Akstovuni til tryggingarfeløg í Føroyum í sambandi við, at eigari ella brúkari hevur teknað ábyrgdartrygging fyri akfar sbrt. § 55 a í ferðslulógini. Her uppi í upplýsingar um nummarplátumiss í sambandi við manglandi tryggingargjald fyri akfar, sum er tryggjað í viðkomandi tryggingarfelag.

Sum er, hava tryggingarfeløgini Tryggingarfelagið Føroyar og Trygd elektroniska atgongd til at síggja upplýsingar um øll akfør og upplýsingar um eigarar, brúkarar og upplýsingar um nummarplátumiss fyri persónar og akfør, sum eru tryggjað í viðkomandi tryggingarfelag. Uppskotið tryggjar, at tryggingarfeløgini fáa eina ítøkiliga heimild til elektroniska atgongd til akfarsskránna.

Við tíðini er alt skrivligt samskifti millum Akstovuna og tryggingarfeløgini blivið talgilt, og í sambandi við lógarálagda ábyrgdartrygging av einum akfari hevur tað avgerandi týdning fyri tryggingarfelagið, at núverandi skráseting og tryggingarstøða akfarsins eru kend, tó ikki upplýsingar um nummarplátumiss fyri manglandi tryggingargjald, um akfarið er tryggjað í hinum tryggingarfelagnum, sum tí er fjald og mett sum ein óviðkomandi upplýsing.

Sambært § 4, stk. 2 í ferðslulógini er eigari ella brúkarin tann, sum hevur ræði á akfarinum. Hetta er endurtikið í § 5, stk. 3 í skrásetingarkunngerðini nr. 34 frá 14. apríl 1983.

Við heimild í § 11 b, stk. 9 kann landsstýrismaðurin í kunngerð at áseta nærri treytir fyri atgongd til skrásettar upplýsingar til tryggingarfeløgini.

**Í § 11 b, stk. 3** verður skotið upp, at P/F Tunnil vegna feløgini P/F Vágatunnilin, P/F Norðoyatunnilin og P/F Eystur- og Sandoyartunlar fær rætt til at fáa elektroniska atgongd til stakupplýsingar úr akfarsskránni hjá Akstovuni. Umframt upplýsingar um eigara og brúkara ynskja tunnilsfeløgini eisini at fáa tøkniligar upplýsingar um akfarið. Hetta kann eitt nú vera slag av akfari, merki, model, litur, vekt, tal av fólki, nýtsla, tal av akslum og longd.

At feløgini fáa elektroniska atgongd til akfarsskránna merkir, at tunnilsfeløgini senda dátufílur við upplýsingum um nummarspjaldur á akførum, sum hava koyrt gjøgnum tunlarnar, og at upplýsingar úr akfarsskránni síðani sjálvvirkandi og talgilt verða sendar feløgunum aftur.

Latast kunnu ikki upplýsingar úr akfarsskránni um sýns-, tryggingar ella fíggjarviðurskifti.

Endamálið við ásetingini er, at tunnilsfeløgini vilja hava eitt neyvari yvirlit yvir tøkniligar upplýsingar um akførini, sum koyra gjøgnum undirsjóvartunlarnar. Við hesum kann felagið samanseta eina prísskipan, sum er lagað til ferðsluna í tunlunum og til tørvin hjá felagnum at krevja inn nýtslugjøld frá teimum akførum, sum brúka tunlarnar.

Vága Floghavn hevur, sum er, rætt til elektroniskar stakupplýsingar úr akfarsskránni um eigarar og brúkarar av akførum, sum gera brúk av parkeringsøkinum hjá Vága Floghavn. Vága Floghavn skal eftiransa og innkrevja gjald fyri nýtslu av parkeringsøkinum. Skotið verður upp, at nevnda heimild framyvir er ásett í hesi grein í ferðslulógini.

Í **§ 11 b, stk. 4** verður skotið upp, at heimild verður givin peningastovnunum til atgongd til elektroniskar stakupplýsingar um navn og bústað hjá eigarum og brúkarum av akførum.

Sum er, hava peningastovnarnir ikki atgongd til elektroniskar stakupplýsingar um navn og bústað hjá eigarum og brúkarum av akførum, men senda í staðin fleiri ferðir dagliga umbøn um innlit í umrøddu viðurskifti. Hetta er ein bæði tíðarkrevjandi og óneyðug mannagongd, samstundis sum alt annað samskifti verður talgilt. Betri Banki og Bank Nordik hava afturvendandi vent sær til Akstovuna við ynski um at fáa elektroniska atgongd til umrøddu upplýsingar.
Peningastovnarnir í Føroyum hava ment eina ráðgevingarskipan, sum byggir á, at peningastovnurin í sambandi við lánveiting og tinglýsing av panti kunnu heinta upplýsingar um akfarið hjá kundanum við at upplýsa nummarspjaldur, og harvið lætta um ráðgevingartilgongdina.

Tinglýsingin á Umhvørvisstovuni heintar upplýsingar um akfarið, her uppi í skrokknummar úr akfarsskránni hjá Akstovuni. Um skrokknummarið, sum peningastovnurin upplýsir í tinglýsingarskjalinum, víkir tað allarminsta frá skrásetingini hjá Umhvørvisstovuni, t.d. eitt o í staðin fyri 0, so vísir skipanin skjalið frá sær, og øll tilgongdin má byrja av nýggjum. Hetta er sera tíðarkrevjandi, kostnaðarmikið og ikki nøktandi.

Við heimild í § 11 b, stk. 9 ætlar landsstýrismaðurin í kunngerð at áseta nærri treytir fyri atgongd til skrásettar upplýsingar til peningastovnar í Føroyum og áseta gjald til Akstovuna fyri latnar upplýsingar.

Í **§ 11 b, stk. 5** verður skotið upp, at oljufeløg í Føroyum fáa atgongd til elektroniskar stakupplýsingar.
Endamálið við atgongdini til upplýsingarnar úr akfarsskránni er at gera tað møguligt at krevja inn rokningar fyri brennievni í teimum førum, har bilførarar av ósketni ikki hava rindað rokningina fyri brennievni. Onnur endamál kunnu sostatt ikki geva bensinstøðum rætt til at fáa talgilda atgongd til stakupplýsingar úr akfarsskránni hjá Akstovuni.

Stakupplýsingarnar, sum oljufeløgini kunnu fáa eru navn, bústaður og telefon nummar hjá brúkarum og eigarum av akførum. Oljufeløgini kunnu sostatt ikki fáa atgongd til aðrar upplýsingar, sum t.d. upplýsingar um tryggingar- ella sýnsviðurskifti ella tøkniligar upplýsingar um akførini.

Endamálið er ikki, at øll starvsfólkini í hvørjari einstakari bensinstøð skulu hava atgongd til upplýsingarnar úr akfarsskránni, men at starvsfólkini í hvørjum einstøkum føri venda sær til umsitingina í oljufelagnum, sum hevur ávísar útvaldar brúkarar at umsita økið, og á henda hátt fær neyðugu upplýsingarnar fyri at kunna krevja inn pening fyri rokningina.

Í **§ 11 b, stk. 6** verður skotið upp, at geva bilasølum, verkstøðum og eykalutagoymslum atgongd til stakupplýsingar um merki, model skrokknummar og árgang á akførum úr akfarsskránni hjá Akstovuni. Treytin fyri at fáa atgongd til upplýsingarnar er, at hvørt akfar sær frammanundan er eyðmerkt við at upplýsa nummarspjaldur.

Endamálið er at gera tað lættari hjá bilasølum, verkstøðum og eykalutasølum at bíleggja rættar eykalutir.

**Í § 11 b, stk. 7** verður skotið upp, at atgongd til elektroniskar stakupplýsingar úr akfarsskránni um tøkniligar upplýsingar á akførum verður givin til tilbúgvingar, treytað av, at hvørt akfar sær frammanundan er eyðmerkt við at upplýsa nummarspjaldur.

Verandi áseting um bert at geva upplýsing um skrokknummar er ikki nøktandi, og tí verður skotið upp, at víðka heimildina til eisini at fevna um tøkniligar upplýsingar um akfarið, so sum merki, model, árgangur, slag av bili, tal av hurðum.

Broytta heimildin er við til at betra um trygdina hjá sløkkiliðsfólki, sum skulu klippa fólk leys úr bilum eftir samanstoyt, og sum eru vandamiklir orsakað av eitt nú airbags og battaríum. Um ikki verður borið rætt at, kann hetta verða sera vandamikið fyri sløkkiliðsfólkini og onnur, og tí er neyðugt hjá teimum at fáa upplýsingar um tøkniligu útgerðina í akfarinum.

Tilbúgvingarnar í Føroyum hava gjørt avtalu við eitt hollendskt felag, sum hevur ment eina skipan, har tilbúgvingarleiðarin umvegis eina app við at sláa nummarplátuna upp, fær upplýsingar um tøkniligu útgerðina á akfarinum, m.a. hvar airbags sita, og hvar í bilinum akkumulatorin er. Hetta fyri at kunna bróta streymin av, áðrenn klipt verður í akfarið og soleiðis, at ongin kemur til skaða av airbags, sum av misgáum verður útloystur.

Tøkniligu upplýsingarnir úr akfarsskránni verða leypandi latnir hollendska felagnum, Moditech, sum skipar upplýsingarnar, áðrenn teir verða latnir tilbúgvingunum umvegis appina. Ongir persónsupplýsingar verða í hesum sambandi latnir úr akfarsskránni.

**Í § 11 b, stk. 8** verður skotið upp, at upplýsingar, sum eru fingnar eftir stk. 1-5, ikki mugu latast øðrum privatum uttan so, at hetta er heimilað í lóg.

**Í § 11 b, stk. 9** verður skotið upp, at landsstýrismaðurin kann seta kunngerð í gildi, sum ásetur nærri treytir fyri atgongd til upplýsingar úr akfarsskránni, sum verða latnar eftir stk. 1-7. Harafturat kann landsstýrismaðurin áseta gjald til Akstovuna, sum er í samsvari við útreiðslurnar fyri upplýsingar eftir stk. 3-7.

**Til nr. 6, yvirskriftin yvir § 15**
Talan er bert um eina málsliga broyting av tí, at *v.m.* ikki er ein føroysk stytting. Tí verður styttingin broytt til *o.a.*

**Til nr. 7, yvirskriftin yvir § 16**
Talan er bert um eina málsliga broyting av tí, at *v.m.* ikki er ein føroysk stytting. Tí verður styttingin broytt til *o.a.*

**Til nr. 8, yvirskriftin yvir § 16 a**
Talan er bert um eina málsliga broyting av tí, at *v.m.* ikki er ein føroysk stytting. Tí verður styttingin broytt til *o.a.*

**Til nr. 9, § 21, stk. 3**
Skotið verður upp, at landsstýrismanninum verður heimilað, at persónar við bretskum koyrikorti, sum taka bústað her á landi framhaldandi kunnu býta sítt bretska koyrikort um við eitt samsvarandi føroyskt koyrikort, eisini eftir at Stóra Bretland er farið úr ES.

**Til nr. 10, yvirskriftin yvir § 25**
Talan er bert um eina málsliga broyting av tí, at *v.m.* ikki er ein føroysk stytting. Tí verður styttingin broytt til *o.a.*

**Til nr. 11, yvirskriftin yvir § 27**
Talan er bert um eina málsliga broyting av tí, at *v.m.* ikki er ein føroysk stytting. Tí verður styttingin broytt til *o.a.*

**Til nr. 12, yvirskriftin yvir § 28**
Talan er bert um eina málsliga broyting av tí, at *v.m.* ikki er ein føroysk stytting. Tí verður styttingin broytt til *o.a.*

**Til nr. 13, yvirskriftin yvir § 32**
Talan er bert um eina málsliga broyting av tí, at *v.m.* ikki er ein føroysk stytting. Tí verður styttingin broytt til *o.a.*

**Til nr. 14, 15 og 16, § 55 b, stk. 1**
Í greinini er tríggjar ferðir ásett, at "landsstýrismaðurin ásetir" treytir og reglur um m.a. hvussu tryggingarskyldan skal fremjast.

Ein borgari kærdi til Løgtingsins Umboðsmann um, at landsstýrismaðurin ikki hevur gjørt hesar ásetingar. Landsstýrismaðurin hevur ikki nakrar ætlanir um at fremja hesar ásetingar, tí tryggingarfeløgini meta tað vera óneyðugt.

Landsstýrismaðurin hevur heimild til at gera ásetingarnar, um tørvur er á tí.

**Til nr. 17, yvirskriftin yvir § 58**
Talan er bert um eina málsliga broyting av tí, at *v.m.* ikki er ein føroysk stytting. Tí verður styttingin broytt til *o.a.*

**Til nr. 18, § 58 a, stk. 2**
Tá ferðslulógin bleiv broytt í 2009 varð § 16, stk. 3 strikað og stk. 4-6 vóru hereftir stk. 3-5. § 58 a, stk. 2 varð ikki konsekvensrættað, so har framvegis stendur stk. § 16, stk. 5-6, men hetta skal vera § 16, stk. 4-5.

**Til nr. 19, § 58 g, stk. 3**
Tá ferðslulógin bleiv broytt í 2009 datt orðingin "promillukoyring" burtur, og tí verður orðingin í stk. 3 broytt til "rúsdrekkakoyring".

**Til nr. 20, 21, og 22**
Skotið verður upp, at ásetingarnar í §§ 64 a, stk. 3, 64 b, stk. 3 og 64 c, stk. 4 um, at viðskiftafólk í seinasta lagi gerandisdagin áðrenn sýn ella umsýn, skulu boðað frá fyri at sleppa undan at rinda eitt eyka gjald, um tey ikki kunnu møta, verða broyttar til, at tey kunnu boðað frá sama dag, sum sýnið ella umsýnið er, uttan at skula rinda eitt eyka gjald.

**§ 2**

**Til nr. 1**
Talan er um áseting um gildiskomu. Ásetingin hevur við sær, at løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Til nr. 2**
Fyrr enn landsstýrismaðurin setur í gildi kunngerðirnar, sbrt. § 11 b, stk. 3, verða ásetingarnar í § 8 í løgtingslóg nr. 6 frá 8. februar 2000 um fast samband um Vestmannasund, § 6 í løgtingslóg nr. 33 frá 26. mars 2002 um fast samband um Leirvíksfjørð og løgtingslóg nr. 48 frá 12. mai 2015, um rætt hjá P/F Vága Floghavn at fáa upplýsingar frá Akstovuni, verandi í gildi.

Fíggjarmálaráðið

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: